## Logandi brennievni høvuðsorsøk til flogvanlukku

Orsøkin til vanlukkuna á Stord, sum kostaði fýra fólkum lívið og sjey álvarsligan skaða, tá eitt flogfar hjá Atlantsflog fór út av vøllinum undir lending fyri góðum ári síðani, var logandi brennievni, sum kom inn í kabinuna. Hetta er niðurstøðan í eini fyribils frágreiðing, sum norska skaðanevndin er komin við. »Den foreløpige rapporten fra Statens Havarikommisjon for Transport er klar, og et av de viktigste funnene er at brennende drivstoff var en viktig årsak til, at ulykken fikk fatale konsekvenser. Ulykken fikk fatale konsekvenser på grunn av at brennende drivstoff kom inn i kabinen«, skrivar norska Aftenposten.



# Fogh stendur at vinna

**Gallupkanningar vísa, at um fólkatingsval var í dag, fór Anders Fogh Rasmussen at varðveita meirilutan í Fólkatinginum. Men hann hevði kortini tódnað í mun til verandi meiriluta**

POLITIKKUR
*Leo Poulsern*
*leo@sosialurin.fo*



*At Anders Fogh Rasmussen hevur skrivað út nýval hevur skapt rættiligan valfepur í løgtinginum, halda føroysku fólkatingsumboðini*

Hóast tað hevur ligið í luftini leingi, at fólkatingsval fór at verða innan alt ov langa tíð, so kom tað kortini eitt sindur óvart á fleiri, at Anders Fogh valdi at skriva út nýval so tíðliga.

Sjálvur grundgevur Anders Fogh Rasmussen avgerðina við, at tað standa týdningarmiklar avgerðir fyri framman, og tað er óheppi, um tinglimir hugsa meiri um eitt komandi fólkatingsval heldur enn tey málini, sum neyðug eru at gjøgnumføra.

Eisini væntar Fogh, at flokkar fara at spekulera í valinum og ábyrgdarleyst at yvirbjóða hvønn annan í kostnaðarmiklum ætlanum.

Men eisini andstøðan heilsar einum nývali vælkomið. »Vit eru til reiðar«, er boðskapurin hjá øllum andstøðuleiðarunum. Spurd um hví hon heldur, at Andres Fogh skrivar val út júst nú, sigur Helle Thorning-Smith, formaður í Sosialdemokraterne:

- Teir standa framman fyri so nógvum og stórum avbjóðingum, sum teir ikki megna, og tí velja teir at skriva út nýval.

SF hevur somu hugsan og teir hava verið klárir til eitt fólkatingsval síðani september.

Kanning hjá Gallup sigur, at Anders Fogh Rasmussen varðveitir ein meiriluta í Fólkatinginum, men hesin fer eftir øllum at døma at minka við fimm mandatum. Sambært hesi kanningini missir Enhedslisten sína umboðan á Fólkatingi, meðan nýggi flokkurin hjá millum øðrum Nasser Khader fer at fáa sjey umboð.

### Ikki óvart á

Heldur ikki føroysku fólkatingsumboðini eru ovfarin av, at fólkatingsval verður nú, tó at tey høvdu væntað tað nakað seinni.

- Eg kann ikki siga, at tað kemur óvart á. Men hinvegin roknaði eg heldur ikki við, tá eg fór frá húsum í morgun, at val fór at verða útskrivað á miðdegi í dag, segði Anfinn Kalsberg við Rás2 í gjár.

Hann er annars ikki serliga fegin um, at fólkatingsvalið kemur júst nú, tí hann metir, at hetta fer at ávirka arbeiðið í løgtinginum.

- Hetta merkir bara, at valstríðið fer at byrja nú. Tað byrjar við fólkatingsvalinum, og tá tað er av heldur tað fram til løgtingsvalið. Og hetta kann bert ávirka arbeiðið í løgtinginum skeiva vegin, heldur Anfinn Kalsberg.

Hann metir annars ikki, at tað er tann stóri munurin á einum fólkatingsvali og einum løgtingsvali. Men hesaferð kann fólkatingsvalið metast sum ein generalroynd til løgtingsvalið, nú Føroyar eftir øllum at døma verða eitt valdømi.

- Spurningurin verður meiri um persónar hesaferð, sigur Anfinn Kalsberg.

Hin føroyski fólkatingsmaðurin, Høgni Hoydal, sigur, at danska valið longu hevur ávirkað føroyskan politikk.

- Røðurnar av tingsins røðarapalli bóru týðilig boð um hetta, sigur Høgni Hoydal.

Hann vísir á, at fólkatingsval ongantíð hava verið avgerðandi fyri Tjóðveldi.

- Tað hevur altíð verið nakað kollutt nakað, og vit skulu eisini minnast til, at Tjóðveldi ofta als ikki hevur stillað upp til donsku valini. Eg rokni við at stilla upp eisini hesaferð, men vóni, at hetta verður seinasta fólkatingsvalið við føroyskari luttøku, sigur Høgni Hoydal.

# Anfinn stillar ikki upp

**Hetta er ein avgerð, sum eg havi tikið fyri langari tíð síðani, sigur Anfinn Kalsberg**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Anfinn Kalsberg stillar ikki upp til fólkatingsvalið, men verður at síggja á listanum til løgtingsvalið*

Tað vóru ábendingar um tað í gjár, og í dag váttar Anfinn Kalsberg fyri Sosialinum, at hann stillar ikki upp til komandi fólkatingsvalið í november.

- Hetta er nakað, eg havi tikið avgerð um fyri langari tíð síðani um ikki at stilla upp, so tað er ikki nakað, sum er komið knappliga á, sigur Anfinn Kalsberg.

Hann sigur, at fólkatingsarbeiðið í veruleikanum ikki hevur so stóran týdning, og føroyingar hava sum heild lítlan áhuga í tí.

- Tað koma kanska eini trý uppskot um árið fyri tingið, sum hava nakað við Føroyar ella føroysk viðurskifti at gera, vísir Anfinn á.

Hann sigur seg leingi hava havt ætlanir um at skrúva eitt sindur niður fyri blussinum og avvísir, at hann tekur seg aftur fyri ikki at forða fyri undirtøku hjá nýggja formaninum, Jørgen Niclasen.

Viðvíkjandi løgtingsvalinum er støðan ein onnur.

- Eg havi boðað Norðoya Fólkafloksfelag frá, at eg lati meg stilla upp aftur til løgtingsvalið. Men verða Føroyar eitt valdømi er ilt at siga, hvussu tað verður við uppstilling. Tá verður tað helst nakað, sum flokkurin skal taka støðu til, sigur Anfinn Kalsberg.